TROTABÚGV

Í trotabúnum Sp/f Stranda Mekaniski Verkstaður, á Byrgi 7, 490 Strendur, skrás.nr. 1298, SKS 3-134/2013, verður hildin endaligur skiftifundur hósdagin tann 8. januar 2015 kl. 11:15, á skrivstovuni hjá skiftirættinum, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn, til roynd av krøvum og staðfesting av uppskoti til roknskap og útluting við eini dividendu (býtispeningi) á 45,2518 % til vanlig krøv.

Uppskotið við fylgiskjølum kann eftirskoðast á skrivstovuni hjá skiftirættinum.

Fráboðaði krøv og onnur krøv, ið verða fráboðað eftir staðfestan av roknskapinum, kunnu ikki verða tikin við.

Útgjalding verður 4 vikur eftir staðfestingina, um ikki kært er innan ta tíð.

FØROYA SKIFTIRÆTTUR, tann 26. november 2014

TROTABÚGV

Við avgerð tann 1. desember 2014, er Sp/f TallyKey Føroyar, hjánøvn: Tallyflex Tallymate, Tallybee, Traðarvegur 8, 435 Streymnes, skrás.nr. 4788, SKS 3-143/2014, komið undir trotabúarviðgerð eftir áheitan móttikin tann 1. desember 2014 frá likvidator, advokat Annfinn V. Hansen.

Felagið bleiv tikið undir likvidation eftir áheitan, dagfest tann 4. september 2014, frá Skráseting Føroya um tvingsilsavtøku.

Sum fyribils bústjóri er settur advokatur Jens Andrias Vinther, Hansen Thomassen Vinther, Bryggjubakki 22, 100 Tórshavn, j.nr. 2014393.

Tað verður innkallað til skiftifund til val av bústjórn á skrivstovuni hjá skiftirættinum, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn,

hósdagin tann 18. desember 2014 kl. 14:15.

FØROYA SKIFTIRÆTTUR, tann 1. desember 2014.

TILTØK

Gudstænastur 7. desember, 2. sunnudag í advent
Hoyvík: kl. 11, Martin Restorff Jacobsen
Havnar kirkja: kl.11, Marjun Bæk
Vesturkirkjan: kl. 11,Heri J. Joensen. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni. Kirkjukaffi er eftir gudstænastuna
Argir: kl. 11, Lestur.
Talvan gongur fyri Føroysku sjómanskirkjuna. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
Kirkjubøur: kl. 12.15: Heri J. Joensen
Miðvágur: kl. 11, David Johannesen
Haldórsvík: kl. 12, Bergtórur H. Bjarkhamar. Dópur
Norðskála: kl. 12, messa, Emil Olsen
Skála: kl. 11, Símun Persson Jacobsen, altargongd
Glyvrar: kl. 11, Meinhard Bjartalíð. gudstænasta. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
Leirvík: kl 11, Anne Mette Greve Klemensen
Árnafjørður: kl.11, Hanus á Gørðum, altargongd. Talvan gongur fyri sjómanskirkjuna
Christianskirkjan: kl.11, Niels P Danielsen
Christianskirkjan: kl.20.30, Ungdómsguðstænasta Hanus á Gørðum
Sandur: kl. 12, Sonja Klein, virkandi dómprestur, innsetir Havstein Klein í embætið í Sandoyar Prestagjaldi. Talvan gongur fyri: Í menniskjum góður tokki. Útvarpið verður við. Manskórið syngur
Porkeri: kl.12, Patrick de Neergaard
Hamragarður: kl.16, Patrick de Neergaard
Hvalba: 16, Syngja jólini inn. Innsavnan til 'Í menniskjum góður tokki'. Jens Mortan Mortensen

PROKLAMA

Øll, sum hava krøv í búnum eftir Thomas Joensen, Búðarvegur 5, Skálavík, føddur tann 12. september 1953, deyður tann 12. juli 2014, verða við hesum biðin um innan 3 mánaðar frá kunngerð av hesi lýsing at boða frá og skjalprógva krøv síni fyri undirritaða skiftirætti.

Tikið er ikki við skuld.

Krøv skulu gerast upp pr. deyðsdagin, og sendast til advokat Petur Even Djurhuus, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, vísandi til sks.nr. 214/2014, saman við frumriti av teimum skjølum, sum krøvini eru grunda á.

FØROYA SKIFTIRÆTTUR, TANN 26.NOVEMBER 2014.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin 7. desembur kl. 11.00: Gudstænasta og sunnudagsskúli.
Sunnudagin 7. desembur kl. 18.00: Sangløta v/ Argjakórinum. Vit syngja advents- og jólasálmar.
www.koma.fo

Samkoman Marknagil
Fjalsgøta.2, Tórshavn
Sunnudag:
Morgunmøti kl 10.30, sunnudagsskúli kl. 12.00.
Sunnukvøld kl. 18 evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl.20 bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll hjartaliga vælkomin.

Ebenezer
Sunnumorgun kl. 11: Minnismáltíð Harrans (meðan møti er, er barnaansing í køkinum)
Sunnudag kl. 12: Sunnudagsskúli
Sunnukvøld kl. 18: Evangeliskt møti
Mánakvøldið 8. desember kl. 20: kvinnumøti
Týsdag kl. 17-19: Frítíðararbeiði fyri børn 9 ár og eldri.
Mikudag kl. 10-12 er løta fyri mammur og børn
Mikukvøld kl. 20: Læru- og bønarmøti
Hóskvøld kl. 20: Ungdómsmøti
Hjartaliga vælkomin
www.Ebenezer.fo

Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagin kl 15.00 Jólatræ fyri børnum undur skúlaaldur
Sunnudagin kl 18.00 Jólatræ fyri børnum í skúlaaldri

Sjómanskvinnuringurin í Meinigheitshúsinum í Havn
hevur jólahugna mánakvøldið kl. 20.00 v. søgu og pakkaspæli. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

KFUK og KFUM í Havn
Mánadagur 8. desember kl. 15.00 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Ingeborg Jacobsen. Evni: Hornahúsið.
Týsdagur 9. desember kl. 16.30 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Mikudagur 10. desember kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur, hetta er fyri ung.
Hósdagur 11. desember kl. 15.00 í KFUK: Binditreff, allar kvinnur eru vælko±mnar.
Mánadagur 15. desember kl.17.00 í KFUK: Adventsveitsla. Inngang við Sonju Klein. Kristiliga sangkórið syngur. Eydna lesur søgu. Nátturði. Øll eru vælkomin.
Mikudagur 24. desember jólaaftan, kl. 18.00 í KFUK: Tilmelding neyðug á tlf. 211824/311928 áðrenn 20. desember kl. 18.00.

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnukvøldið kl 18.00 møti v/Júsines Poulsen

Frelsunarherurin í Tórshavn
Mánadagur Kl. 17.00 Club-7up
Mikudagur Kl. 17.00 Bønarmøti
Hósdagur Kl. 19, Heimaforbund (jólahugni) tilmeldan
Sunnudagur Kl. 11.00 Halganarmøti
Øll eru hjartaliga vælkomin

Filadelfia
Landavegur 22, Tórshavn
Sunnudagin 7. des.
Kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting. Fríðtór Debes talar.
Kl. 19.00 Hugnaløta fyri ung frá 4. fl.
Kl. 19.00 Sellubólkur hjá Samuel
Mánadagin 8. des.
Kl. 20.00 Bønarskúlin

Adventistakirkjan
Leygardagur 6. desember
Kl.10 Sabbatsskúli við bíbliugransking: Allan Falk
Kl.11 Sabbatsgudtænasta: Harri Allan Falk

Evangeliihúsið
Fríggjakvøld 5. des kl 21
Ungdómurin møtist
Sunnudag 7. des kl 16
Jólafest

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag messa í Kerit kl. 17.30.
Leygardag messa í Kerit. kl. 11.30
Sunnudag hámessa kl. 11 v/Paul Marx, prestur í Mariukirkjuni.
Aftaná messa verður kirkjukaffe.
Sunnudagsskúli verður kl. 14
Tilbiðjan av Heilaga Sakramentinum verður í Kerit frá kl. 17 til 18. Øll eru vælkomin.
www.katolsk.fo

Kollafjarðar Missiónshús
Sunnudagur 7.12.
Adventshugni kl. 16:00 í ítróttarhøllini. Veri hjartaliga vælkomin :)
Týsdagur 9.12.
Bønarløta kl. 19:30
Bíbiltími kl. 20:00

Missiónshúsið Libanon, Sørvági
Sunnudagur 7. desember kl. 14, sunnudagsskúli.
Kl. 17, møti. Valdemar Simonsen talar og Oda Lauritsen endar. Herman Winther syngur.
Mánadagur 8. desember kl. 20, bíbliutími. Sonni Jacobsen tosar.

Sandavágur
Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið 9/12 kl. 20 í Meinigheitshúsinum, til jólahugni.
Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Hvalvíkar Missiónshús
Sunnudagin 7.des. Møti kl.18.00 við Bodil og Malmberg Olsen. Sangur við heimligum kreftum. Innsavnan til húsið.
Týsdagin 9.des. Ungdómsmøti kl.20.00
Mikudagin 10.des. Bíbiltími kl.20.00 við Ingibjørg Askham
Verið hjartaliga vælkomin

Eiði, Karmel
Sunnudagin kl. 17 familjumøti við Marian Nielsen, barnaráðgeva. Eftir familjumøtið verður nátturði.

Lívsins Orð, Runavík
Sunnudaginkl.17,00 Møti
Øll hjartaliga vælkomin

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Mikudagin 3. des. kl. 19:30 Bíbliutími
Hósdagin 4. des. kl. 18:30-20:00
Junior - fyri øllum í 4.-7. fl.
Fríggjadagin 5. des. kl. 21:00 Ungdómsmøti
Leygardagin 6. des. kl. 10:00 Menn møtast
Sunnudagin 7. des. kl. 15:00 Jólafest fyri børnum
kl. 17:00 Møti. Tala: Jensina og Jónsvein Simonsen
kl. 17:00 Simba
www.glyvrar.fo

Soli Deo Gloria
Sunnudagin kl. 17.00 bøn
Sunnudagin kl. 18.00 møti*

KFUM & K Klaksvík
Leygardag
kl. 09-12 Arbeiðsdagur. Vit fáa kaffi umleið 10.15. Allir menn og kvinnur vælkomin
Sunnudag
kl.14.00 Sunnudagsskúli
kl.17.30 Bønarløta
kl.18.00 Sjómansmøti. Sjómenn greiða frá sjómanslívinum umborð og vísa myndir. Barnaansing er undir møtinum
kl.20.30
Ungdómsguðstænasta við altargongd í Christianskirkjuni við Hanus á Gørðum
Øll hjartaliga vælkomin
Vitja okkum eisin á facebbok kfum&kklaksvik

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin 7. dec. Kl. 14.00 sunnudagsskúli.
Kl. 18.00 møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroysk jólagudstænasta í London
hevur árligu Jólagudstænastuna nú sunnudagin 7. december í Donsku Kirkjuni í London, St Katherine's Precinct.
Guðstænastan byrjan kl 14. Bergur Debes Joensen, prestur, prædikar.
Eins og vanligt er, er frokostbuffét frá 12:00 (serstakt gjald).
Eftir guðstænastuna verður borðreitt við kaffi og kökum.

Pensionistafelagið í Havn
10. desember kl. 19 hevur pensionistafelagið hugnaløtu í Losjuni, við burturluting. (Havið pakka við.) Limir kunnu takað gest við.
NB! Jólaborð verður á Skúlaheiminum 17. desember kl. 18. Kostnaður 275,- kr. fyri hvønn.
Seinasta freist at boða frá luttøku og at gjalda er 12. desember.
Gjaldast kann til formannin Høgna Højgaard, ella í Eik Banka
konto nr. 9181 - 4543590.
(Viðmerkið navn og bið um kvittan.)

Sorgarbólkur fyri vaksin, ið hava mist ein kæran
Bólkurin møtist umleið 3.hvørja viku. Áhugað kunnu venda sær til bólkaleiðararnar.
Margret Mortensen
tlr. 223456 og Sigrun Heldarskarð 265432

Vitjunarvinir til Reyða Kross Føroya
Bryggjubakka 2, Tórshavn
Um onkur hevur hug at verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi, eru til vælkomin at ringja til fyriskiparar Eyrith tlf. 513784 ella Marin 284333, teldupost eyrith@redcross.fo ella marin@redcross.fo og redcross@redcross.fo

Virkin sum longst
Vit møtast hvønn mánadag frá kl. 15 til 18 í Sørvágs skúla. Drekkamunnur og køka er at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið Blákollan í Sunda kommunu
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14 til 18. Øll eru vælkomin.

Dagtilhaldið í Vági er byrjað aftur
Opið er týsdag og hósdag frá 15-18
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið í Tórsgøtu
21 tlf. 316491/286491
Opið mánadag-fríggjadag kl. 9–16
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo Heimasíðan: tilhaldid.fo
Drekkamunnur er til keyps, eins og blóðini eru til taks
Mánadagur 8. des.
9 – 16 Motiónsrúmið opið
09.00 – 12.00 A. Maskinbinding
09.00 – 16.00 Teldustovan opin hvønn dag uttan fríggjadag seinnapartin
09.00 Fimleikur menn
10.00 Fimleikur kvinnur
12.00 – 16.00 Horn- og beinarbeiði
14.00 – 16.00 Hugnaløta
OBS!!
Tilmelding til túrin til Paris 16 – 26. august 2015.
Meira kunning um túrin í Tilhaldinum ella á heimasíðini tilhaldid.fo
Týsdagur 9. des.
9 – 16 Motiónsrúmið opið
9 – 16 Teldustovan opin
OBS!!!!
10.00 Sangur við harmonikuliði.
Øll eru hjartaliga vælkomin
14.00 – 16.00 Hugnaløta
Mikudagur 10. des.
09.00 – 16.00 Motiónsrúmið opið. 09.00 – 16.00 Teldustovan opin
09.00 – 12.00 Horn- og beinarbeiði
09.00 – 12.00 B. maskinbinding
09.30 Fimleikur menn
14.00 – 16.00 Hugnaløta
09.00 – 16.00 Pútumarknaður o.a. marknaður til jóla á veghæddini
Hósdagur 11. des.
9 – 16 Motiónsrúmið opið
9 – 16 Teldustovan opin
09.00 – 12.00 Veving
10.00 Fimleikur kvinnur
11.00 Lesibólkur kvinnur.
Hittast á bókasavninum á 1. hædd
Í Tilhaldinum. Kunning sjá skránna í komandi viku
14.00 – 16.00 Hugnaløta
Fríggjadagur 12 .des.
9. – 16 Motiónsrúmið opið
12.00 – 14.00 B. Telduskeið til jóla. Undirvíst verður eftir tørvi hjá tí einstaka. Til ber at hava sína egnu farteldu við
09.30 Fimleikur menn
10.30 Lesibólkur menn.
Hittast á bókasavninum á 1 hædd í Tilhaldinum. Kunning, sjá skránna í komandi viku
14.00 – 16.00 Hugnaløta
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv.
Vit ynskja, at øll skulu kenna seg vælkomin!